## So er Ballack klárur

Eftir øllum at døma stendur nú greitt, at Michael Ballack fer at spæla við Chelsea. Tosað hevur verið um framtíðina hjá týska landsliðsskiparanum í fleiri mánaðir, og fyri tað mesta hevur Chelsea staðið ovast á breddanum. Enn hevur tó ikki borið til at fáa nakað váttað, men í dag skuldi Chelsea halda tíðindafund á Stamford Bridge, og væntandi stóð undirskriftin hjá Ballack á breddanum her. Gitt verður, at lønin hjá Ballack verður 500 mió kr. í fýra ár.

**-mørk**



## Eisini Shevchenko

Chelsea ætla sær eftir øllum at døma eisini at vissa sær ukrainska stórskjúttan, Andrei Shevchenko. Eftir sjey ár í Milan heldur framherjin, at hann hevur tørv á nýggjum avbjóðingum. Konan er úr USA, og tí sigur hann, at hann helst vil til Onglands at spæla. Gitt verður, at Chelsea er felagið, sum stendur fremst við stóra pengapunginum.

**-mørk**





*Reina hevði ein óhepnan leiklut í málinum hjá Dean Ashton, men gjørdist alíkavæl dagsins hetja við 3 bjarginum í brotsparkskappingini*

*mynd: scanpix.dk*

# Reina tók 3 brotsspørk

**Liverpool vann F.A. Cup finaluna eftir longda leiktíð og brotssparkskapping. Stóra hetjan gjørdist Liverpool málmaðurin Reina, ið tók 3 av 4 brotspørkum**

FA-CUP

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Einans 40 ára gamli Teddy Sherringham megnaði at fáa bóltin framvið Reina, meðan Zamora, Konchesky og Ferdinand allir sóu Reina taka skot teirra.

Hislop í West Ham málinum tók skotið hjá Hyppia, og hóast hann fór rættan veg eftir skotunum hjá Hamann, Gerrard og Riise, so megnaði hann ikki at steðga teimum. Finalan var frálík og verur ivaleyst ein klassikari, ið fólk fer at hava á orði í nógv ár.

Tá vanliga leiktíðin í F.A. Cup finaluni var av, var 3-3 millum Liverpool og West Ham. Eftir 90 minuttir við sera álopskendum og fantastiska undihaldandi fótbólti, var støðan javnleikur. Leikararnir gjørdu seg klárar til umdystin, ið tó ikki nakrantíð fekk sama brodd, sum vanligi dysturin, men hetta var mest tí helvtin av leikarunum gekk og haltaði. Skaddi Harewood spældi víðari hóast hann næstan ikki fekk gingið, hann fekk ein risa møguleika, men rakti við síðuna av, tí hann fekk ikki staðið á skadda fótinum. Tí endaði umdysturin eisini 3-3.

West Ham var frammanfyri 2-0 ,tá ein hálvur tími var spældur, bæði málini sjálvmál av Jamie Carragher, og mál av Dean Ashton komu aftan á feilir á ávikavist miðvølli og verju hjá Liverpool. Liverpool spældi sjuskutt hesa løtuna. Men eftir málið til 2-0 vaknaði Liverpool, og Cissé skoraði til 1-2 áðrenn steðgin. Síðan javnaði Gerrard og Liverpool trýsti West Ham, sum tó hevði møguleikar. Í 63. minutti skoraði Konchesky til 3-2 til West Ham, ið síðan stýrdu dystinum. Men í 90. minutti javnaði Gerrard til 3-3.

### Størsti dagur í enska fótbóltsárinum

F.A. Cup finalan er ein av allar størstu, um ikki tann størstu hendingunum á enska fótbóltsárinum, tí er sera nógv gjørt burtur úr á Millenium Stadion í Cardiff, áðrenn dystin millum West Ham United og Liverpool.

Millenium Stadium hevur enn einaferð fingið æruna av, at verða karmur um hesa risa hending í enska fótbóltskalendaranum. Ætlanin var annars at F.A. Cup finalan skuldi verða fyrsti dystur á nýggja Wembley Stadium, men byggingin av Wembley varð tíanverri somikið seinkað, at hetta ikki bar til.

# Yngru føroyameistararnir í amboðsfimleiki funnir




*Rani Petersen í ringunum. Hann gjørdist nummar trý í kappingini í ringunum sunnudagin*

**Flottur amboðsfimleikur var at síggja í Runavík um vikuskiftið, tá ið ítróttarhøllin var karmur um FM-kappingarnar fyri pinkur, piltar, gentur og dreingir í amboðsfimleiki**

FIMLEIKUR

*Lív Reinert Kjeld*
*liv.reinert.kjeld@sosialurin.fo*

Um vikuskiftið skipaði Føroya Fimleikasamband fyri tveimum kappingum í amboðsfimleiki í ítróttarhøllini í Runavík. Fitt av fólkið var og hugdi, tá ið fimleikararnir vístu síni kynstur á gólvi, bita, í lopi og ringum. Hesar kappingarnar vóru fyri yngru fimleikararnar, t.v.s. pinkur, piltar, gentur og dreingir, og fimleikararnir kappaðust í tveir dagar, leygardagin og sunnudagin. Fimleikararnir vóru frá Fok, Ljósinum, Havnar Fimleikafelag og Støkk.

Kappingin leygardagin var skipað í tveimum; fyrra kappingin byrjaði kl. 11:30. Tá kappaðust genturnar og pinkurnar í basic line og dreingirnir og piltarnir í seríðkan. Seinna kappingin, sonevnda ”all round FM kappingin”, var um føroyameistaraheitið í amboðsfimleiki. Tilsamans vardi kappingin í heilar sjey tímar, so talan var næstan um rættiligan maraton-fimleik. Kappingin leygardagin var samstundis kvalifikatión til amboðsfinalurnar sunnudagin, har seks teir bestu fimleikararnir kappaðust um føroyameistaraskapin í hvørjum amboði fyri seg.

Sunnudagin vóru amboðsfinalurnar so á skránni. Henda kappingin gekk munandi skjótari og betur enn fyrra dagin. Tó má sigast, at tað sást, at fimleikararnir vóru troyttir eftir longu kappingina leygardagin; lopini gjørdust í so tung hjá nógvum; so sjálvur fimleikurin var ikki so flottur, sum hann kundi verið.

Feløgini, sum kláraðu seg best, vóru Støkk og Havnar Fimleikafelag, sum áttu so at siga allar fimleikararnar í amboðsfinalunum sunnudagin, og allir føroyameistararnir vóru úr hesum báðum feløgunum.

Komandi vikuskiftið verða somu kappingar á skránni fyri eldru fimleikararnar, t.v.s. kvinnu- og mansunglingar, kvinnur og menn. Hesar kappingarnar verða í ítróttarhøllini á Hálsi í Havn.